| | |
|---|---|
| **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**23. september 2004** | Blað nr.: **5970** |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **23. september 2004**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr:** **118/04-134/04**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Jan Christiansen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jákup Suni Joensen
Høgni Mikkelsen
Bjarti Mohr
Schumann Hjaltalin
Sjúrður Olsen
Tórfinn Smith
Elin Lindenskov
Hildur Eyðunsdóttir
Jógvan Arge
Leivur Hansen
Jan Christiansen
Annfinn Brekkstein fyri Kirkjubøar kommunu
Jógvan Thomsen fyri Nólsoyar kommunu

**LUTTÓK IKKI:**
Beate L. Samuelsen, ið var burturstødd í kommunalum arbeiðsørindum
Heðin Mortensen, ið var burturstaddur

**LUTTÓK EISINI:**
Heri Olsen

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM, kl. 18.00:**

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**125/04** **200400038**

**Mál beind í nevndir.**

**Býráðið 23. september 2004:** Tikið til eftirtektar.

**126/04** **200400016**

**Ársfíggjarætlanin 2005 hjá Tórshavnar kommunu.**

Uppskot til ásetan av karmum til gerð av uppskoti til fíggjarætlan.

**Fíggjarnevndin 19. august 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at góðtaka uppskot til karmar til gerð av ársfíggjarætlan, ið javnvigar við 453.024 tús. kr.

**Býráðið 2. september 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at taka undir við fíggjarnevndini og at beina uppskotið til viðgerð í fíggjarnevndini og nevndunum.

**1. viðgerð:**
**Fíggjarnevndin 16. september 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til, við 1. viðgerð, at samtykkja uppskotið til ársfíggjarætlan fyri 2005, sum javnvigar við t.kr. 460.245.

**Býráðið 23. september 2004:** Einmælt samtykt.

**127/04** [200400034]

**Ársfíggjarætlan 2005 hjá Tórshavnar Havn.**

**1. viðgerð:**
**Havnanevndin 14. september 2004:** Samtyktu fíggjarætlanina við 1. viðgerð, sum janvnvigar við kr. 48.230.000,00, og at senda hana til býráðið um fíggjar-nevndina.

**Fíggjarnevndin 16. september 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til, við 1. viðgerð, at samtykkja uppskotið til ársfíggjarætlan fyri 2005, sum javnvigar við t.kr. 48.230.

**Býráðið 23. september 2004:** Einmælt samtykt.

**128/04** [200401748]

**Umsókn frá Óla Johansen um keyp av geira burtur av matr. nr. 1292d.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Óli Johansen, Tinghúsvegur 68, 100 Tórshavn, søkir kommununa um at keypa umleið 26 $m^2$ av matr.nr. 1292d, Tórshavn, til samanleggingar við hansara grundstykki, matr.nr. 1290, Tórshavn.

Óli Johansen ætlar at bróta tann gamla ljóta betonggarðin niður niðan móti Læknahúsinum og seta ein nýggjan vakran garð við træverki omaná í staðin.

Ætlanin er at fríðka um og gera tað rúmligari at parkera og venda uppi á heygnum hjá sær og grannanum. Óli skal ikki byggja út, men møguliga seta nakrar runnar niður.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at økið verður selt, við tað at økið ikki liggur í skipaðari útstykking.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. august 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býararkitektinum.

**Fíggjarnevndin 16. september 1004:** Samtykt at mæla býráðnum til at selja økið fyri kr. 78,00 pr. $m^2$.

**Býráðið 23. september 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**129/04** **200401482**

**Viðvíkjandi yvirtøku av vegøki á matr. nr. 1179v,Tórshavn**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Eigarin av matr. nr. 1179v, Tórshavn, John V. Justinussen, í Svanga 27, søkir um at kommunan yvirtekur matr. nr. 1179v, Tórshavn part av vegnum í Svanga.

Vegurin er í síni tíð gjørdur liðugur og lýkur treytirnar til yvirtøku.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at yvirtaka vegøkið.

**Tekniska nevnd 22. juni 2004:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. august 2004:** Málið tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 16. september 1004:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 23. september 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**130/04** **200401701**

**Viðvíkjandi yvirtøku av Vørðubrekku matr. nr. 40a og 39g, Kirkjubøur**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Eigararnir av Vørðubrekku á Argjum søkja kommununa um at yvirtaka Vørðubrekku.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at Vørðubrekka verður yvirtikin.

**Tekniska nevnd 24. august 2004:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum.

**Fíggjarnevndin 16. september 1004:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 23. september 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**131/04** **200400823**

**Fríðtíðarskúli og skúli til Hoyvíkar skúla**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
**Útvegan av lendi**
Byggideildin hevur fingið til vega dispositiónsuppskot av skúla og frítíðarskúla til 1. og 2. flokk til Hoyvíkar skúla. Skúlin og frítíðarskúlin er 2-sporaður til umleið 96 børn. Hjálagt j. nr. 200400823.

**Grundøkið :**
Ognin liggur í A3 øki í 3. grundumráði.

Ognin – matr. nr. 1df er 19.978 $m^2$.

Ognin er í dag ábygd við skúlabygging og venjingarhøll:

**Hoyvíkar skúli:**
Grundvídd : 2850 $m^2$
Gólvvídd : 3212 $m^2$

**Hoyvíkshøllin:**
Grundvídd : 1340 $m^2$

Grundvídd tilsaman á grundøki er : 4190 $m^2$
Byggistigið er 0,21 og nettonýtslustigið er 0,23.

Á serstøkum matrikli 1dg inni í matr.nr. 1df, stendur ein fordeilarastøð hjá Føroya Tele – ein lítil betongbygningur, sum húsar kaðalinnstallatiónum.

Økið byggjast skal á, liggur eystanfyri og niðanfyri bygningin hjá Føroya Tele, eystur ímóti parkeringsplássinum, sí støðumynd.

Bygningurin verður tilsamans 710 $m^2$ til støddar.
Grundvíddin verður 410 $m^2$

| | |
|---|---|
| Byggistigið við ætlaða bygginga verður | 0,25 |
| Nettonýtslustigið við ætlaða byggingina verður | 0,26 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at bygt verður 710 m² á matr.nr. 1df, vísandi til ásetingarnar fyri økið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. august 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býararkitektinum og at beina málið víðari í mentamálanevndina um teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 24. august 2004:** Málið var útsett til teknisku viðurskiftini eru lýst, so sum atkoma, vegir, parkering, o.a.

**Ískoyti:**
Í sambandi við mál nr. 200300215 – Nýggjur fólkaskúli í Hoyvíkshaganum – hevur mentamálanevndin 3. mars 2004 samtykt at byggja ein skúlabygning við verandi Hoyvíkar skúla, sbrt. støðumynd, dagfest 3. mars 2004, sum skal kunna hýsa yngstu flokkunum og frítíðarskúla, og samtykt at játta kr. 100.000,00 av íløgujáttanini 2004 til gerð av dispositiónsuppskoti at leggja aftur fyri nevndina skjótast gjørligt, og beina málið til byggideildina.

Byggideildin hevur fingið til vega dispositiónsuppskot, sum verður lagt fyri nevndina til góðkenningar. Dispositiónsuppskotið hevur Selmar Nielsen arkitektur gjørt.

Tey teknisku viðurskiftini verða viðgjørd á tekniskanevndarfundinum sum væntandi verður 7. september 2004.

Við einum $m^2$ uppá kr.15.265 verður samlaði kostnaðurin íroknað 6,25% mvg. mettur at verða kr. 10.837.903.

Selmar Nielsen, arkitektur verður við á fundinum.

Tá dispositiónsuppskotið er góðkennt er umráðandi at útbjóðingartilfarið verður gjørt og arbeiðið boðið út skjótast tilber soleiðis at tíðarætlanin dagfest 25.06.2004 kann haldast.

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at góðkenna dispositións-uppskotið við tíðarætlan dagfest 25.06.2004. Tað ber til at forcera tíðarætlanina til skúlabyrjan, men tað hevur ein meirkostnað við sær.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin í mentamálum mæla til at taka undir við tekniska stjóranum og býararkitektinum

Eisini verður mælt til at kr. 2.150.000 verða játtaðar av íløguætlanini fyri 2004 og kr. 8.700.000 av íløguætlanini fyri 2005.

**Mentamálanevndin 7. september 2004:** Nevndin samtykti at taka undir tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og deildarleiðaranum í mentamálum og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið til samtyktar.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram uppskot til støðutakan.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at nevndin tekur undir við framlagda uppskotinum.

**Tekniska nevnd 7. september 2004:** Nevndin samtykti at beina málið í ferðslunevndina til ummælis, og at umsitingin ger uppskot til frásetingarmøguleika til skúlan inn frá Karlamagnusarbreyt.

**Ferðslunevndin 14. september 2004:** Málið umrøtt.

Ferðslumyndugleikin tekur ikki støðu til málið viðvíkjandi framtíðar ferðsluviðurskiftum ísv. bygging á frítíðarskúla, fyrr enn ferðsluviðurskiftini ísv. Ítróttarhøllina í skúlaøkinum eru avgreidd.

**Fíggjarnevndin 16. september 2004:** Samtykt at leggja málið fyri býráðið.

**Býráðið 23. september 2004:** Atkvøtt varð um tilmæli frá mentamálanevndini, 7. september 2004, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Jan Christiansen, Jákup Suni Joensen, Høgni Mikkelsen, Bjarti Mohr, Tórfinn Smith, Elin Lindenskov, Hildur Eyðunsdóttir, Jógvan Arge og Leivur Hansen.

Greiddi ikki atkvøðu: Schumann Hjaltalin og Sjúrður Olsen.

**132/04** **200401740**

**Graslíki við barnagarðin á Hamrinum á Argjum.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tórshavnar kommuna stendur í boði at fáa ein graslíkisvøll 13x20 m, sum UEFA letur til Fótbóltssamband Føroya. Kommununnar partur verður at gera økið klárt at leggja graslíki á.

Landsbyggifelagið hevur gjørt eina kostnaðarmeting viðvíkjandi jørð, betong og asfaltarbeiðinum.

**Álegging av graslíki á nýggjan vøll við dagstovnin á Hamarinum á Argjum.**

**Jørð og betongarbeiði v.m.**

| | |
|---|---|
| **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**23. september 2004** | Blað nr.: **5977**<br>Formansins merki: |

| Slag av arbeiði | Nøgd | Einleika prísur | Saml. kostn. í kr. |
|---|---|---|---|
| **Jørðarbeiði:** | | | |
| Bleytt tilfar (mold og mógvur) at grava av og leggja til viks. Tilfarið verður seinri at nýta til gerð av skráum | 350 m³ | 80,- | 28.000,- |
| Uppfylling við gróti (við gróti sum liggur á staðnum) | 200 m³ | 50,- | 10.000,- |
| Uppfylling við grót keypt úr broti) | 950 m³ | 180,- | 171.000,- |
| Javning við 0-75 mm | 400 m² | 80,- | 32.000,- |
| Skráar at leggja við mold, taða og sáa | 180 m² | 100,- | 18.000,- |
| **Dren:** | | | |
| Ø 110 mm drenrør, íroknað grevstur legging og tyrving við skervi | 60 m | 300,- | 18.000,- |
| **Betongarbeiði:** | | | |
| 25 x 50 cm betongkantur at stoypa kring vøllin, íroknað 2 stk. ljósmastra-fundament | 12 m³ | 5.000,- | 60.000,- |
| **Asfaltarbeiði:** | | | |
| Javning við skervi og sproyting við asfalti 51/m² íroknað asfaltering av gøtum | 380 m² | 120,- | 45.600,- |
| **Elarbeiði:** | | | |
| Ljósmastrar, íroknað armatur, kaðalar, grevstur og íbinding | 2 stk. | 9.000,- | 19.000,- |
| At leggja útfyri uml. 15% | | | 60.400,- |
| Tilsamans u/ MVG kr. | | | 462.000,- |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin í mentamálum mæla til at játta peningin kr. 490.000 av íløgum á barnaansingarøkinum 2004.

**Mentamálanevndin 7. september 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarstjóranum og deildarleiðaranum í mentamálum og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið til samtyktar.

**Fíggjarnevndin 16. september 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 23. september 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**133/04** **9900345**

**Mál viðvíkjandi yvirtøku av Tórshavnar Ítróttar- og Samkomuhøll.**

**Mentamálanevndin 3. mars 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við uppskotinum til skeytið og reglugerð fyri Tórshavnar Ítróttar- og Samkomuhøll, dagfest 2. mars 2004, frá Advokatfelagnum við Strond 4

**Fíggjarnevndin 11. mars 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og at keypa høllina fyri kr. 1,00.

**Býráðið 18. mars 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Tórshavnar Ítróttar- og Samkomuhøll treingir til umfatandi umvælingar, nú høllin er farin um tey tríati árini.

Síðsta metingin, ið varð gjørd fyri nøkrum árum síðani, vísti, at høllin skuldi umvælast fyri 6-7 mió. kr.

Peningurin 2.850 mió. kr. er sett av á konto 64 til umvælingar av høllini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin í mentamálum mæla til, at byggideildin fær loyvi at brúka peningin á konto 64 til bráneyðugar umvælingar av høllini, treytað av at eigaraviðurskiftini eru avgreidd, og at ein nýggj byggiteknisk meting verður gjørd av høllini.

**Mentamálanevndin 7. september 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið til samtyktar.

**Fíggjarnevndin 16. september 1004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarstjóranum og deildarleiðaranum í mentmálum.

**Býráðið 23. september 2004:** Einmælt samtykt.

**134/04** **200402250**

**Áheitan á mentamálaráðið um fleiri námsfrøðingar.**

Býráðslimur biður kommununa um at senda eina áheitan til mentamálaráðið, um at fleiri námsfrøðingar kunnu fáa útbúgving í Føroyum, soleiðis at kommunan kann yvirhalda lógarásettu krøvinu um 2/3 av námsfrøðingum á hvørjum stovni.

Í løtuni verður bert ein flokkur við 20 næmingum tikin inn á hvørjum ári.

**Býráðið 23. september 2004:** Einmælt samtykt at heita á mentamálaráðið, um at fleiri námsfrøðingar kunnu fáa útbúgving í Føroyum, soleiðis at kommunan kann yvirhalda lógarásettu krøvinu um 2/3 av námsfrøðingum á hvørjum stovni.

**135/04** **200402287**

**Mál um keyp av lendi til minni graslíkisvøll á Hamrinum á Argjum.**

Í sambandi við ætlanina um at gera minni graslíkisvøll á Hamrinum á Argjum, sum bæði børnini ið búgva har um leiðir og ansingarstovnurin kunnu nýta, er neyðugt at kommunan keypir áleið 1.475 m2 av festinum hjá Poul Müller, bónda. Økið liggur millum dagstovnin á Hamrinum og koyribreytina, sunnanfyri niðankoyringina til dagstovnin, sambært tekning nr. 04-21, mál nr. 1211.

Talan er um ikki velt hagalendi, og er samlaði kostnaðurin á leið 80.000 kr. at fíggja av konto 83.

**Býráðið 23. september 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**FUNDUR LOKIN KL. 19:10**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| | Jákup Suni Joensen | Høgni Mikkelsen |
| Bjarti Mohr | Schumann Hjaltalin | Sjúrður Olsen |
| | Tórfinn Smith | Elin Lindenskov |
| Hildur Eyðunsdóttir | Jógvan Arge | Leivur Hansen |
| Annfinn Brekkstein | Jógvan Thomsen | |
| | Jan Christiansen | |